

# CHE hevur kostað Javnaðarflokkinum

**Stóra orsøkin til vánaligu veljarakanningina hjá Javnaðarflokkinum er, at sambandssinnaðu javnaðarveljarar ikki góðtóku, at flokkurin var við í CHE-samgonguni, og saman við óhepnum gerðum hjá formanninum ger hetta, at Javnaðarflokkurin ikki hevur fótað sær enn, heldur Dennis Holm, samfelagsfrøðingur**

Leo Poulsen

Tað, sum mest loypir í eyguni í hesi veljarakanningini, sum Dennis Holm, samfelagsfrøðingur og stjóri á Granskingardeplinum, og Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur hava staðið fyri, er stóra lopið, sum Sambandsflokkurin ger.

Heili 10,1% fer flokkurin fram, men sambært Dennis Holm er tað ikki so nógv tað, sum Sambandsflokkurin hevur gjørt rætt, ið flytir veljararnar, men heldur tað, sum Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin hava gjørt skeivt.



- Javnaðarflokkurin hevur havt eina javna niðurgangandi kurvu í nógvum teimum seinastu veljarakanningunum, og tað kemst fyri ein stóran part av, at sambandsvongurin í flokkinum var ónøgdur við, at flokkurin fór upp í CHE-samgonguna, sigur Dennis Holm.

Men hetta er kortini ikki einasta orsøkin til, at flokkurin fær so lítla undirtøku í hesi veljarakanningini.

- Javnaðarflokkurin hevur staðið fyri nøkrum óhepnum hendingum. Eitt nú legði Jóannes Eidesgaard á landsfundi flokksins upp til at skipa blokkpolitikk í Føroyum, har Javnaðurin skuldi verða reyði parturin, og verður tulkað sum ein fríggjan til Tjóðveldi. Og tað hóvar ikki sambandsvonginum í flokkinum, sigur Dennis Holm.

Í triðja lagi vísir samfelagsfrøðingurin á, at tað var Jóannes Eidesgaard, ið stóð á odda fyri lønarsamráðingunum, og sum harvið kveistraði semingsuppskotið av borðinum, sum gav alment løntu somu lønarhækkan sum teimum privatu.

### Ófriður kostar

Tað er tó ikki bert Javnaðarflokkurin, sum missir veljarar til Sambandsflokkin.

- Tað hevur verið nógvur ófriður í Fólkaflokkinum seinastu tíðina. Poul Michelsen stakk í sekkin og rýmdi úr flokkinum, og tað skapti ein ófrið, har eisini aðrir politikarar innanfloks vístu ónøgd, sigur Dennis Holm.

Hann heldur eisini, at málini móti Bjarna Djurholm og Jacob Vestergaard, hava havt ávirkan á veljarakanningina hesaferð.

- Sami tendensur sæst í Fólkaflokkinum sum í Javn-

# Hatta verður neyvan valúrslitið

**Tað er ongantíð áður hent, at nakar flokkur hevur fingið yvir 30 prosent av atkvøðunum. Tí væntar Alfred Olsen, næstformaður og formaður i tingbólki Sambandsflokkurin, at flokkur hansara sær so gott úrslit á komandi løgtingsvali**

Randi Jacobsen

Alfred Olsen var bilsin í morgun, tá ið hann fekk at vita, at í nýggjastu veljarakanningini fær Sambandsflokkurin 31,1 prosent av atkvøðunum. Úrslitið gevur 10 sessir í løgtinginum.

Hetta er ein framgongd uppá 10,1 síðan løgtingsvalið í 2008.

Hann hevur onga greiða tulking av hesi stóru framgongd, og til spurningin, um Sambandsflokkurin hevur uppiborið henda sigur, svarar hann bara:

- Er nakað uppiborið í politikki?

Framgongdin hjá Sambandsflokkinum svarar neyvt til tað, sum hinir báðir samgonguflokkarnir missa. Hví veljararnir skulu fara frá Javnaðarflokkinum og Fólkaflokkinum, dugir Alfred Olsen ikki at siga.

- Eg havi álit á veljarakanningini, men eg seti spurnartekn við, at úrslitið við eitt val hevði verið so gott. Tað er ongantíð áður hent, at nakar flokkur hevur fingið nsæan triðju hvørja atkvøðu. Bara eina ferð hevur Javnaðarflokkurin upp ímóti hesum góða úrslitinum.

# Veljararnir tala at

**Jørgen Niclasen heldur, at veljararnir tala nú at gongdini í Fólkaflokkinum seinastu mánaðirnar. Avbjóðingin er nú at brynja flokkin til næsta løgtingsval**

Uni Holm Johannesen

- Eg vil ikki siga, at eg eri fegin um úrslitið. Tað er hinvegin eingin loyna, at eg bar ótta fyri einum verri úrslit.

Tað sigur Jørgen Niclasen, formaður í Fólkaflokkinum.

Flokkurin fær ein undir vangan í nýggjasta veljarakanningini. Fólkaflokkurin fer 3,7 prosent aftur í mun til seinasta val, og missir eitt tingfólk.



Formaðurin sigur, at afturgongdin er minni, enn hann hevði væntað.

Jørgen Niclasen skal loysa fleiri knútar sum oddamaður. Poul Michelsen hevur takkað fyri seg í flokkinum, hann umboðaði í fleiri enn 40 ár.

Grundvirðini verða ikki vird longur, og minnilutin ræður í flokkinum, segði hann.

Fleiri tóku undir við Michelsen. Úrslitið var ein flokkur, sum var í svárum trupulleikum.

Umframt rokið við Poul Michelsen, gnagar málið um løggildu grannskoðararnar eisini flokkin inn á bein, sum Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, tók til á landsfundinum. Bjarni Djurholm var landsstýrismaður í vinnumálum, tá grannskoðararnir fingu løggildingina.

Annika Olsen staðfesti, at flokkurin er í kreppu á landsfundinum.

- Tað verður sagt frá vinnulívsfólki, at tey hava ilt við at síggja vinnuliga kósina hjá flokkinum, og miðstaðarøkið hevur tey seinastu árini vent tummulin niður til flokkin. Vit mugu finna samleikan aftur, vit mugu koma ungdóminum á tal, og vit mugu modernisera okkum, segði Annika Olsen.

### Kanska eitt persónligt álop

Jørgen Niclasen tekur undir við landsstýriskvinnuni.

Hann vísir á, at flokkurin hevur framt smærri innanhýsis broytingar, og størri broytingar eru á veg.

Tað ber ikki til staðfesta,